# Røkka í hvønn krók í heiminum

**Við eini heildarveiting til viðskiftafókini og einum sterkum samstarvsfelaga í rygginum, hevur tað bara gingið fram á hjá Eur-Express**

Tað eru nú fimm mánaðir síðani at tríggir mans keyptu farmadeildina hjá Flogfelagi Føroya.

Teir góvu felagnum navnið Eur-Express og hava brúkt hesa fyrstu tíðina til at fóta sær og fáa virksemið í eina fasta legu.

Og tað hava teir havt eina heppna hond við.

Besta prógvið um tað, er, at teir hava ikki mist eitt tað einasta viðskiftafólk, sum farmadeildin hjá Flogfelagnum hevði.

Tvørturímóti er tað bara lagst afturat, so at skarin av viðskiftafólki er alsamt vaksin og tað eru teir avbera fegnir um.

Og nú Fish Fair er, verður hetta samstundis fyrstu ferð at teir fara undir eitt marknaðarføringstiltak av álvara.

## Ómakaleys heildarveiting

Eur-Express kann bjóða viðskiftafólkunum eina heildarveiting, har teir taka sær av øllum farmi til og úr Føroyum.

Tað merkir, at teir senda, taka ímóti, tollavgreiða og levera.

Tað eru serliga tær minni nøgdirnar, teir hava lagt seg eftir at handfara.

- Og har kann vera talan um vørur av øllum slagi. Vit hava eisini avgreidd smærri nøgdir av fiski til marknaðir ymsa staðni úti í heimi, helst við flogfari, sigur Rúni Magnusson í Eur-Express.

- Hinvegin er fiskaflutningur ofta í størri nøgdum, so í hesum sambandi avmarkar loftvegis flutningurin seg sjálvur, tí vit hava hvørki flogfør ella flogvøll til at taka størri nøgdir.

Men tað mesta, teir á Eur-Express takast við, er inngangandi farmur og teir levera um alt landið fyri teirra viðskiftafólk.

Og har eru teir serstakliga væl fyri, tí teir samstarva við flutningsfelagið TNT.

- TNT er eitt altjóða flutningsfelag av teimum heilt stóru við 160.000 starvsfólkum og umboðsfólkum um allan heimin.

Sostatt fáa vit levera vørur um allan heimin við snarflutningi.



*Á Eur-Express veita teir viðskiftafólki eina ómakaleysa heildarveiting og tað liggur væl fyri einum einum stórum, altjóða flutningsfelagi sum samstarvsfelaga*

## Fingurin á pulsinum

Nógvur flutningur er loftvegis og í tí sambandinum koyrir Eur-Express eisini nógv ímillum Havnina og Vágar.

- Vit koyra kortini og tá kunnu vit akkurát tað sama taka farm við ímillum Havnini og Vágar og levera hann til móttakaran.

Rúni Magnussen heldur, at tað er ein avgjørd styrki, at teir í Eur-Express eru allir vágamenn og búgva har vesturi, hóast skrivstovan er í Havn.

Tað ger, at vit koyra øvugta rutu, sum aðrir veitarar. Tað merkir, at tað liggur væl fyri at fara á flogvøllin og hann metir eisini, at teir eru oftari á flogvøllinum enn aðrir veitarar.

- Tað heldur hann er ein fyrimunur, tí tá ið vørur verða bílagdar loftvegis, kunnu kapasitetstrupulleikar gera, at hon ikki altíð er við ætlaða flogfarinum.

- Tí ber ikki altíð akkurát at vita, nær vøran kemur.

- Men av tí at vit búgva har vesturi, liggur væl fyri at fara á flogvøllinum títtari enn aðrir kunnu, fyri at kanna eftir um ávís vøra er komin.

Rúni Magnusson sigur, at higartil hava teir mest fingist við loftvegis farm, men at teir avgjørt ætla at bjóða viðskiftafólkinum eisini eina góða tænastu í sambandi við sjóvegis flutning.

Annars er EUR-Express uppkallað eftir teimum trimum eigarunum, Eron Debes, Una Danielsen og Rúna Magnusson.




Sosialurin